


www.oljan.fo

**Jan Müller** 04 - 05 - 2012

# Greenpeace steðgaði ísbrótara á veg til Arktis

Fólk hjá umhvørvisverndarfelagsskapinum Greenpeace steðgaðu fyrr í dag ísbrótaranum Nordica, sum oljufelagið Shell skal brúka í sambandi við oljuboring í Arktis seinni í ár. Ísbrótarin var á veg úr Eystrasalti, men síðani í morgun hevur hann ligið stillur sunnan fyri donsku oynna Lolland, tí fólk hjá Greenpeace leypa støðugt í havið og svimja beint fyri gronini á honum. Seinni hendi so tað, at ísbrótarin fekk hjálp frá løgregluni og slapp víðari á ferð síni. Hetta er ikki tann fyrsta royndin hjá Greenpeace at steðga tí 116 metrar langa ísbrótaranum. Tá skipið skuldi fara úr Helsinki fyrr í vikuni, fóru meiri enn 20 fólk hjá Greenpeace umborð, men finska løgreglan fór eftir teimum og koyrdi tey í land. Fyrradagin tóku seks Greenpeace-fólk seg umborð á skipið úti fyri svensku oynni Øland, og tá skipið kom til Karlskrona, fóru servandir løgreglumenn umborð eftir teimum. Shell ætlar at bora eftir olju úti fyri Alaska í summar, og hesum er Greenpeace harðliga ímóti, og tí roynir felagsskapurin at forða ætlanini hjá oljufelagnum. Annars hevur Shell fingið øll síni loyvi uppá pláss at kunna fara undir at bora norðan fyri Alaska.

